

# Haldið Sosialin

## ... tí góð bløð hanga ikki á trøunum

TÝSDAG
MIKUDAG
HÓSDAG
FRÍGGJADAG
LEYGARDAG

Sosialurin er lættur at tryggja sær.

Tekna eitt hald fyri einans 400,- KR. UM ÁRSFJÓRÐINGIN
og spar 380,- kr. ella 47% í mun til at keypa hann í leysasølu.
(600 kr. um ársfjórðingin í Danmark - ella 500,- kr. fyri 5 blað 1 ferð um vikuna)

Um tú frammanundan er haldari, kanst tú harafturat halda
Internet-Sosialin fyri einans 120,- kr. um ársfjórðingin.

Ja!

Eg tekni meg sum haldara av Sosialinum og gleði meg til at fáa blaðið 5 ferðir um vikuna fyri 400,- kr. um ársfjórðingin.

Navn:

Bústaður:

Postnr./Bygd/Býur:

Telefonnummar:

Undirskrift:

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn




# Ferðsluóhapp í Hósvík

**Ein bilur fór niðanav vegnum í Hósvík, og ein ungur maður breyt beinið í ferðsluóhappi á Tvøroyri**



*Seinnapartin týsdagin fór hesin bilurin útav vegnum sunnanfyri Hósvík. Ein kvinna var í bilinum, og hon fekk ongan skaða*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

FERÐSLA
*Stefan í Skorini*

Seinnapartin týsdagin hendi eitt ferðsluóhapp í Hósvík, tá ein kvinna misti tamarhaldið á bili sínum. Kvinnan fekk ongan stórvegis skaða.

Bilurin koyrdi suðureftir, og í svinginum beint sunnanfyri bygdina misti førarin tamarhaldið á bilinum og fór niðanav vegnum. Løgreglan veit ikki at siga, hvør orsøkin til óhappið var.

Týsdagin var eitt annað ferðsluóhapp á Vegnum Langa í Havn, har tveir bilar stoyta saman. Annar bilurin fer av ókendum orsøkum yvir í hina farbreytina, og tískil stoyta bilarnir frontalt saman.

Eingin mannskaði hendi, men materielli skaðin var stórur, verður sagt av løgreglustøðini í Havn.

**Breyt beinið á knallert**

Sunnukvøldið var ein 23 ára gamal maður so óheppin at bróta beinið í einum ferðsluóhappi á Tvøroyri. Maðurin koyrdi á knallert, tá hann rendi í ein garð.

Maðurin varð fyrst fluttur á Suðuroyrar Sjúkrahús, men seinni var neyðugt at flyta hann til Havnar, har hann varð lagdur undir skurð fyri beinbrotið.

Løgreglan hevur tikið blóðroynd av manninum fyri at fáa greiðu á, um hann var ávirkaður.

# Heidi svimur í Kanada

**Svimjarin Heidi Andreasen er í hesum døgum saman við svenska venjara sínum í Kanada og luttekur í stórari kapping**

SVIMJING
*Stefan í Skorini*

Heidi Andreasen er við í kappingini "Canadian Open for Swimmers with a Disability". Kappingin verður hildin í kanadiska býnum Edmonton, sum liggur í statinum Alberta í vesturkanada.

Heidi og svenski venjari hennara Mats Brisenfeldt komu til Kanada tann 8. juli saman við tí danska ferðalagnum. Kappingin byrjar í dag, tá Heidi skal svimja 50 metur frí. Dagarnar áðrenn kappingina hevur Heidi verið á venjingarlegu saman við venjara sínum.

**Luttekur í fimm greinum**

Kappingin verður frá hósdegi 17. juli til sunnudagin 20. juli. Heidi skal luttaka í 50 metur frí í dag, 400 metur frí verður fríggjadagin, leygardagin er tað 200 metur frí og sunnudagin skal hon royna seg í 100 metur frí og 100 metur firvaldasvimjing.

Heidi skuldi verið før fyri at fingið heiðursmerki í onkrari av greinunum, um alt gongur eftir vild.

Allir teir bestu svimjararnir í heiminum við breki eru við í hesi kappingini, so at hetta kann samanberast við eina heimsmeistarakapping. Tí er hetta tann størsta avbjóðingin hjá Heidi í ár.

Hetta er eisini ein liður í fyrireikingunum til Paralympics, sum verður í Athen í 2004.

# Tríggir ungir leikarar til Danmarkar

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Í hesum døgum eru Jann Ingi Petersen, Marni Djurhuus og Poul N. Poulsen í Danmark og venja við donskum feløgum.

Jann Ingi Petersen frá B68 venur við danska 2. deildar felagnum Fremad Amager, og Marni Djurhuus úr EB/Streymi og Poul N. Poulsen úr VB venja við Brøndby í danska høvuðsstaðnum.

Talan er ikki um beinleiðis royndarvenjing, men heldur um at leikararnir skulu fáa nakrar royndir í øðrum londum og ungum árum, so at teir eru betri fyri til framtíðar avbjóðingar.

# Tjaldur í 2. deild

TÍÐINDASKRIV
*Hondbóltur*

Á eykaaðalfundi hjá hondbóltsambandinum leygardagin var samtykt at tað bert verða 6 lið sum spæla í 1. deild hjá monnum komandi ár. Hetta merkir at Tjaldur flytur niður í 2. deild komandi kappingarár.

Tey bestu liðini hjá hondbóltsfelagnum Tjaldur verða tískil at síggja í næstu bestu deildini komandi kappingarár. Hetta hendi samstundis, sum felagið skrivaði undir sáttmála við danskan ungdómsvenjara.

Ætlanin hjá Hondbóltsfelagnum Tjaldur er at menna ungdómsdeildina og at felagið skal verða meira sjónligt bæði á vølli og uttanfyri.


# Skips Sosialurin
## - TÍÐINDI TIL SJÓFÓLK



**Nú er tað gjørligt hjá okkara sjófólki at fylgja við hvat hendir**

Fá ein heilan Sosial sum e-mail, hvørja ferð hann kemur út.

Henda útgáva er gjørd á ein slíkan hátt, at hon fyllir minst møguligt og tískil skjót at heinta niður. Hetta er gjørt við at grafikkurin er tikin burtur, so einans teksturin er eftir og síðani pakkaður niður. Blaðið er sjálvútpakkandi á telduni og verður lisið við browsara, umframt at møguleiki er fyri at skriva alt blaðið út.

Útgávan er serliga ætlað okkara sjófólki, ið hevur atgongd til e-mail umborð á skipinum.

Stuðlað Skips Sosialin hevur
KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag

Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

*Undirritaði teknar seg sum haldara av Skips - Sosialinum og fái fyrsta mánaðin ókeypis*

Navn á skipi:
Kontakt pers.:
e-mail:
Undirskrift:

**Hava tygum spurningar í hesum sambandi ring 213982 ella e-mail:** *skipssosialurin@sosialurin.fo*

☐ *Tekst útgáva*
☐ *HTML útgava ( uttan útskrift )*
☐ *HTML útgáva ( við útskrift )*

Sosialurin